e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Frásagnir frá steypafinalunum verða í blaðnum týsdagin

Dupultbrak uppi á Hálsi

Ávíkavist klokkan 16.00 og 18.00 skulu báðar steypafinalurnar í hondbólti spælast. Hjá kvinnunum hava VB og Kyndil leikt seg fram til avgerandi dystin, meðan tað á mannfólkasíðuni eru havnarliðini bæði, Kyndil og Neistin

Jákup Mørk

Síðani seinastu hálvfinalurnar vórðu avgreiddar seinasta vikuskifti, hevur mesta hondbóltsprátið í høvuðsstaðnum og í Suðuroynni ivaleyst verið um, hvussu úrslitini munnu fara at laga seg í teimum báðum dystunum.

ÍtróttarSosialurin verður sjálvandi hjástaddur, tá dystirnir verða settir í gongd, og á hesum síðum hava vit gjørt eina upptakt til dystirnar.

Spennandi

Einki er at ivast í, at talan í báðum førum verður um tveir sera spennandi dystir, har so at siga alt kann henda.

Onkur vil kanska vera við, at Neistin á mannfólkasíðuni og betra helvtin hjá Kyndli noyðast at átaka sær leiklutin sum favorittar, grundað á støðuna á stigatalvuni. Hesum er undirritaði í øllum førum ósamdur í, tí dystirnir í landskappingini kunnu als ikki sammetast við steypadystir.

Um so var, áttu finalurnar helst at staðið millum nøkur heilt onnur lið, tí hvørki av oddaliðunum í teimum báðum bestu deildunum eigur umboð í finaludystunum.

Regina stóran týdning

Hjá kvinnunum er tað sum kunnugt VB og Kyndil, sum skulu gera av, hvør av teimum skal standa eftir við steypinum, tá avtornar.

Suðuri í Vági vóru vónirnar til kappingarárið sera góðar undan kappingarárinum, men úrslitini hava verið nakað misjøvn, og liggja tær tí einum kanska skuffandi fimta plássi á stigatalvuni.

Lítið er tó at ivast í, at støðan kundi verið nógv betri, tí vágbingar eiga ein heilt góðan leikarahóp, og í Reginu Rádó hevur VB ein leikara, sum, um lagið er hitt rætta, kann avgera dystin nærum einsamøll.

Í landskappingini hevur tað tó verið soleiðis, at teir dystirnir, har nógv hevur staðið á, so at siga hvørja ferð eru koppaðir til fyrimuns fyri mótstøðuliðið.

Í steypakappingini hevur tó ligið betri fyri, og í hálvfinaluni bastu tær einum neistaliðið, sum annars hevði havt sera góðan byrð síðani ársskiftið.

Besta málverjan

Mótstøðulið teirra í kvøld, Kyndil, verður av mongum mett sum favorittur undan dystinum, og tað er í øllum førum ein sannroynd, at liðið hevur fingið nógv burtur úr, síðani tær í januar mánaði skifti venjara.

Undir leiðslu av Bárða Johannesen hevur tað eydnast teimum at bast suverena klaksvíksliðnum. Suverena er kanska í so nógv sagt, tí tá úrslitini av teimum báðum hálvfinalunum móti Stjørnuni vórðu løgd saman, høvdu kyndilskvinnurnar 10 mál meira enn klaksvíkingarnir.

Ein hin mest sjónligi leikarin á kyndilsliðnum er helst ársins leikari seinasta ár, Lotte Sørensen. Sjálvandi er tað eisini rætt, at hon hevur stóran týdning fyri avrikið hjá liðnum, men eftir mínum tykki stendur týdningarmesti leikarin hjá Kyndli í málinum.

Marita Hermansen hevur eftir mínum tykki verið nógv tann málverjin í landinum hetta kappingarárið, og í fleiri dystum hevur hon verið høvuðsorsøkin til, at kyndilsliðið hevur fingið stig burturúr.

Er lagið á Maritur hitt rætta, kann hon uttan iva tryggja Kyndli sigurin, men sum omanfyri nevnt hevur VB eisini leikarar, sum kunnu avgera dystin, so uttan iva verður talan um ein sera javnan finaludyst.

Kyndil og Neistin

Hjá monnunum verða tað havnarliðini bæði, Kyndil og Neistin, sum sínamillum skulu avgera, hvør teirra skal standa eftir við steypinum.

Kyndilsliðið hevur í ár havt eitt heldur misjavnt kappingarár, har fleiri stig eru mist í seinastu løtunum av dystunum. Liðið hevur higartil í ár tapt 7 dystir, men verður sæð burtur frá seinasta tapinum móti Neistanum, hevur talan hvørja ferð verið um teir vælkendu marginalarnar, sum ikki hava verið í parti við Kyndli.

Í steypakappingini lá tó betri fyri, og eftir tvær sera spennandi hálvfinalur móti arvafíggindanum úr Vestmanna, eydnaðist tað teimum at vinna sætið í finaluni.

Um ein skal peika á nakra ávísa styrki hjá Kyndli, so má tað vera breiddin í hópinum. So at siga á øllum plássum hava teir í minsta lagið tveir góðar leikarar, hóast Jacob Jónsson kortini má sigast at hava størsta týdningin fyri liðið.

Hetta kom serliga til sjóndar í seinnu hálvfinaluni móti VÍF, har kyndilsliðið frá dystarbyrjan mátti vera Bjarna og Hannis Wardum fyri uttan, og harumframt misti Regin Petersen tíðliga í seinna hálvleiki. Hóast missin av hesum trimum leikarum, megnaði liði kortini at varveita eitt máls leiðsluna frá fyrra dystinum, soleiðis at finalusessurin kundi tryggjast.

Helst er tað eisini ein fyrimunur hjá Kyndli, at finaludysturin so at siga kann bjarga teimum kappingarárið. FM-heitið er helst um at fara út eygsjón, og hava teir tískil alt at vinna og einki at tapa í finaludystinum.

Kompleksið er burtur

Hjá Neistanum er eitt sindur øðrvísi statt, tí hóast teir uttan iva vilja fáa fatur á steypinum, so hevur dysturin ikki eins stóran týdning hjá teimum, sum hjá Kyndli.

Teir eru hóast alt væl við í kappingini um FM-heitið, ikki minst takkað verið teimum trimum sigrunum á Kyndli higartil í ár.

Hetta kann eisini vísa seg at hava alstóran týdning fyri gongdina í dystinum, tí har Neistin kanska fyrr hevur havt eitt undirlutakompleks mótvegis Kyndli, hava teir ikki roynt at tapt móti grannunum í hesum kappingarárinum.

Einki er at taka seg aftur í, at stóra styrkin hjá neistaliðnum er í álopspartinum. Toppskjúttarnir báðir, Heini og Áki, hava verið ein alstórur trupulleiki hjá øllum verjunum í landinum, men liðið telur eisini fleiri aðrar góðar skjúttar.

Finnur Hansson, Áki Mørk og Kári Mortensen eru allir leikarar, sum ikki halda seg aftur, fáa teir nóg stórt rásarúm, og serliga í seinasta dystinum móti Kyndli prógvaðu teir, at tað ikki er nøkur patentloysn at mansverja Heina og Áka.

Eisini á málmansplássinum er Neistin væl fyri, men hinvegin hevur uppgávan hjá málverjunum ofta verið ótakksom, tí verjuparturin á liðnum ikki hevur riggað nóg væl.

Hetta er tó batnað munandi gjøgnum árið, og seinastu dystirnar hevur tað verið ein stór hjálp, at løgtingsmaðurin, Jákup Sverri Kass, er komin aftur til landið.

Verjuparturin á liðnum er tó enn ikki nóg sterkur til at tryggja liðnum sigurin, og tískil er tað helst ein fortreyt fyri sigurin, at álopsspælið koyrir nóg væl í dag.

Hetta man Sophus Dahl Christiansen helst eisini hava hugsað um, og uttan iva hevur hann hugsað um okkurt móttrekk mótvegis bláu grannunum.

Jú, av sonnum er lagt upp til eina sera spennandi og undirhaldandi finalu. At ytru karmarnir verða í lagi er lítið at ivast í, og leikararnir fara helst at gera sítt til, at undirhaldið á vøllinum skal verða eins gott og uttanfyri strikurnar.

Hagtølini

Á talvunum niðanfyri sæst, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini í finaluna hava hitst higartil í kappingarárinum.

Ikki tí, enn er ongantíð komið fyri, at hagtølini hava avgjørt, hvussu úrslitið í nøkrum dysti fer at verða. Hinvegin er aloftast áhugavert at síggja, hvussu liðini hava staðið seg í innanhýsis uppgerðunum.

Tískil hava vit á talvunum víst, hvussu úrslitini hava verið í innanhýsis uppgerðunum, hvørjir málskjúttarnir hava verið, eins og víst er, hvussu nógv brotskøst eru farin í málið, og hvørjir leikarar hava fingið tveir av fingrunum hjá dómaraparinum at síggja.

Eftir er bert hjá okkum at ynskja øllum, bæði leikarum, dómarum og áskoðarum tveir góðar dystir, har ítróttarliga virði vónandi verður sett í høvuðssætið.

VB - Kyndil

24 - 24
22 - 36

út	brotskøst	mál	Leikari	Leikari	mál	brotskøst	út
1	6	20	Regina Rádo	Lotte Sørensen	16	7	2
0	0	9	Arnleyð Krosslá	Ann Hansen	14	1	0
1	0	7	Rannvá Augustinussen	Beinta Sørensen	13	0	1
0	3	6	Sólrun Krosslá	Jórun Ludvig	6	0	1
0	0	3	Gurið Mortensen	Palma Petersen	5	0	0
2	0	1	Laila Jespersen	Rakul N. Joensen	3	0	0
1	0	0	Christina Holm	Semona Fjallstein	1	0	2
1	0	0	Eyðbritt Krosslá	Jensia Petersen	1	0	1
				Anya Midjord	1	0	0
6	**9**	**46**	**Tilsamans**	**Tilsamans**	**60**	**8**	**7**

Kyndil - Neistin

23 - 24
25 - 26
22 - 30

út	brotskøst	mál	Leikari	Leikari	mál	brotskøst	út
5	4	12	Hans Á. D. Christiansen	Áki Olsen	27	4	0
0	2	11	Hannis Wardum	Heini Joensen	22	8	3
0	2	10	Bjarni Wardum	Kári Mortensen	10	0	0
1	0	9	Jacob Jónsson	Áki Mørk	9	0	0
2	2	8	Uni Wardum	Karl O. Rasmussen	6	0	1
1	0	6	Rúni Poulsen	Finnur Hansson	4	0	0
0	0	5	Regin M. Petersen	Elmar Ósá	1	0	0
1	0	4	Janus E. Sørensen	Regin Didriksen	1	0	0
0	0	2	Niels V. Niclasen	Jákup Sverri Kass	0	0	2
0	0	2	Leivur Holm				
0	0	1	Róar Nielsen				
10	**10**	**70**	**Tilsamans**	**Tilsamans**	**80**	**12**	**6**

Vit vinna

Vit skulu vinna

Jórun Ludvig er li›forma›ur á kvinnuli›num hjá Kyndli, sum í dag skal á vøllin í fyrra finaludystinum. Á›ur hevur hon roynt at veri› partur í tveimum steypafinalum, men í hvørgari av hesum eydna›ist ta› henni at fáa lut í gle›ini yvir sigurin.

Hesu fer› ætlar hon tó at ta› skal vera. Favorittar vil hon ikki kalla kyndilsli›i›, men sum hon sigur: »Vit skulu vinna!« . Bá›ar tær fer›irnar, har Jórun hevur veri› á tapandi finaluli›num, hevur ta› veri› Neistin, sum hevur veri› mótstø›uli›i›. Spurd um hon kanska er fegin um, at ta› ikki er Neistin, sum stendur hinumegin strikuna tá byrja› ver›ur svarar hon, at hetta er fullkomuliga líka miki›. Ein steypafinala er altí› spennandi, tí so at siga alt kann henda.

Kyndilskvinnurnar hava ikki havt so øgiliga gó›ar stundir til at fyrireika seg til steypafinaluna, tí fyri ta› fyrsta er bert ein vika sí›ani, at tær leiktu seg til finaludystin, og harumframt leiktu tær ein sera t‡dningarmiklan dyst t‡skvøldi›.



Tann dystin taptu tær, men sambært Jórun, var hetta fyrst og fremst teirra egna skuld, men sjálv heldur hon, at tær nú skulu prógva, at tær megna at reisa seg aftur. Annars grei›ur Jórun frá, at tær rættuliga hava fingi› gó›an byr› eftir venjaraskifti›, og at moralurin á li›num er í topp í løtuni.

Vi› kappingarársbyrjan søgdu tær á kyndilsli›num, at máli› fyri ári› var at tryggja sær europeiska luttøku. Hetta mál hava kyndilskvinnurnar framvegis, og megna tær at vinna dystin í kvøld, er hetta mál eisini rokki›, vi› ta› at ein vunnin steypafinala gevur rætt til europeiska luttøku.

At sjálvsáliti› hjá kyndilskvinnunum er í lagi, er líti› at ivast í. Tá vit nevndu omanfyristandandi fyri Jórun, svara›i hon nevnliga: »Ja, um vit ikki ver›a meistarar«.

JM

Okur vinna

Vónirnar eru gó›ar

Or›ini omanfyri eigur li›skiparin á VB-li›num, Sólrun Krosslá. Hon sigur at tær sjálvandi hava ætlanir um at vinna dystin, tí annars kann alt jú gera ta› sama.

Sy›sta hondbóltsfelagi› í landinum hevur annars havt eitt sera misjavnt kappingarár, og sjálv er Sólrun ikki so væl nøgd vi› gongdina, sum hon hevur veri› higartil.

Fleiri dystir hava tær veri› sera nær vi› at vunni›, men aloftast eru hesir koppa›ir til fyrimuns fyri mótstø›uli›i›.

-Ja, vit hava veri› eitt sindur ov stuttar í nøkrum dystum, og so høvdu vit eisini ein ni›urtúr, har vit taptu fleiri dystir á ra›, sigur Sólrun um kappingarári› higartil.

Dysturin í dag kann tó als ikki sammetast vi› teir, sum li›i› hevur leikt í landskappingini, heldur Sólrun. Hetta kom eisini til sjóndar seinastu dystunum móti Neistanum, har ta› var stórur munur á dystinum í landskappingini og teimum bá›um hálvfinalunum.

Annars grei›ur Sólrun frá, at tær hava fyrireika› seg sum best har su›uri seinastu vikuna. Venjingin hevur so at siga veri› hin sama, men tosi› á vøllinum hevur so at siga bert veri› um finaludystin. Ska›ar er ikki talan um, so líti› er at ivast í, at tær koma nor›ur til Havnar vi› fullari manning, og har umframt kemur Gu›run á Láabø eisin heim til dystin.

Ví›ari sigur Sólrun, at tær eru allar sera uppsettar til henda dystin, og eisini eru ta› fleiri av vi›haldsfólkunum, sum hava tosa›um at fara til Havnar ein túr, og so er at vóna, at ta› er naka› um tosi›.

Talan hevur tó ikki veri› um beinlei›is fyrireikingar til nakra fer›, men li›skiparin vónar, at ta› ver›a fleiri áskó›arar, sum leggja lei›ina til Havnar saman vi› leikarunum. Heldur ikki er ókent, at ta› er rættuliga fitt av su›ringum, sum dagliga búleikast í Havnini, og munnu ikki fleiri av hesum eisini fara at leggja lei›ina framvi› Ítróttarhøllini á Hálsi í dag?

JM

Vit vinna

Vænta at vinna

Tá fremsta mansli›i› hjá Kyndli fer› á vøllin í dag, ver›ur ta› vi› einum fyri eyga›, at vinna!

Uni Wardum, sum hetta kappingarári› hevur havt ábyrgdarstarvi› sum li›forma›ur, sigur vi› Sosialin, at ta› als ikki ber til at tosa› um favorittar í slíkum dysti, men kortini væntar hann, at teir vinna dystin móti grannunum úr Neistanum.

-Gott nokk hava vit tapt tríggjar fer›ir móti Neistanum í ár, harav talan í einum føri var um stórtap, men fyri okkum er talan um t‡dningarmesta dystin í árinum, sigur Uni.

Ví›ari sigur hann, at leikararnir eru sera væl fyrireika›ir til dystin, og sí›ani seinnu hálvfinaluna móti VÍF, hevur finaludysturin veri› fremst í hugaheiminum hjá leikarunum.

Hetta kom eisini t‡›uliga til sjóndar í Vestmanna mikukvøldi›, tá Kyndil var heilt nær vi› at tapa landskappingardystin móti KÍF, sum liggur ni›ast á stigatalvuni.

Li›forma›urin sigur, at hjá teimum er ta› alt ella einki. Hann heldur sjálvur, at møguleikarnir fyri meistaraheitinum mest sum eru foknir, tí munurin upp til tr‡ tey ovastu li›ini er vor›in ov stórur. Tá er ta› ø›rvísi hjá Neistanum, tí teir hava hóast alt meistaraheiti› at spæla fyri, um ta› skuldi kiksa í finaluni.

Fyrr hevur Uni veri› vi› til at vunni› steypakappingina tvær fer›ir, men tær fer›irnar var ta› í bláa neistabúnanum. At mótstø›uli›i› í finaluni júst er fyrrverandi felagi›, heldur Uni tó ikki hevur naka› serligt at siga, tí í slíkum dystum ber als ikki til at hugsa um kenslurnar.

Kyndilsli›i› hevur seinastu tí›ina havt onkrar ska›ar at dragast vi›, men væntandi ver›a allir leikarar klárir til dystin í dag. Hannis Wardum hevur veri› skaddur eina tí›, og var fyri fyrstu fer› á vøllinum aftur mikukvøldi›, Eisini var Regin Petersen at síggja í tí dystinum, eftir at hann í seinnu hálvfinaluni móti vestmenningum fekk bæ›i pentur og heilaskjálvta. Lars Winther hevur eisini havt onkran lítlan ska›a, og kundi ikki luttaka í venjingini hóskvøldi›, men væntandi ver›ur hann eisini klárur, tá dysturin ver›ur settur í gongd.

JM

Vit vinna

Fara eftir steypinum

Stendur ta› til li›formannin hjá Neistanum, Heina Joensen, ver›ur ta› Neistin, sum fer avsta› vi› steypinum á mannfólkasí›uni.

Eftir hansara tykki ber als ikki til at tosa um nakran favoritt, men at talan heldur er um ein 50/50 dyst. Hann leggur kortini dent á, at teir sjálvandi fara eftir sigrinum.

Ví›ari sigur hann, at ein finala altí› er naka› serligt, og at hann ivast ikki í, at li›ini bæ›i fara at geva alt ta› tey orka.

Tær tríggjar fer›irnar, sum li›ini bæ›i hava hitt hvørt anna› higartil í ár, hevur Neistin ligi› oman á, eins og bláa li›i› hevur sta›i› seg betri í landskappingini, men sambært li›formanninum, hevur hetta ongan t‡dning.

-Tvær av teimum trimum fer›unum, var bert eitt mál á muni, og í tri›ja dystinum var talan um sera gó›an dag hjá okkum, sigur kollfir›ingurin, sum nú er búsitandi í Havn. Ví›ari sigur hann, at hetta heldur ikki gevur nakra orsøk at vænta ein sigur. Talan er jú um ein heilt annan dyst í dag, so hetta eigur ikki á nakran hátt at vera nakar koddi hjá okkum.

-Kyndil hevur eitt sera gott li› vi› nógvum gó›um leikarum. Breiddin í hópinum er stór, teir hava gott fólk á øllum plássum, eins og talan er gó›ar skjúttar í bæ›i høgra og vinstra bor›i og tann sannroynd, at teir í hálvfinaluni vunnu á vestmenningum, bo›ar frá, at talan er um eitt av allarbestu li›um í landinum í løtuni, heldur altso Heini Joensen.

Eingir ska›ar hava gjørt um seg, nú ta› stundar til finaludystin, so allir mans skuldu veri› tøkir. Annars grei›ur hann frá, at teir sum so ikki hava havt serligar venjingar í sambandi vi› stóru uppgávuna í dag. Venjingin hesa vikuna hevur tó ikki veri› so hør› sum vanligt, men hevur annars ikki veri› merkt av finaludystinum.

Allir leikararnir eru tó, sum vera man, rættuliga uppsettir til dystin, og sum Heini sigur, so ynskja teir allir at vinna dystin, og fara teir uttan iva at gera sítt allarbesta, so ta› ber til at røkka hesum máli.

JM